Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Makrel í NRK

Konsertin hjá Makrel á Storåsfestivalinum á ólavsøku gekk somikið væl, at bólkurin beinanvegin varð biðin um at spæla tvær konsertir í Trondheim, hesar konsertir vóru á spælistøð-unum Samfundet og 3B í vikuskiftinum. Umframt arbeiði slapp bólkurin eisini í norsku fjølmiðlarnar millum annað NRK.

NRK, sum er almenna norska sjónvarpið, tók alla konsertina upp, og í stóra dagblaðnum í Tróndheim fekk bólkurin eitt jaligt ummæli.

Á heimasíðuni Makrel.net siga Makrel, at festivalurin var herligur, og at teir millum annað vóru í uttandurabað á festival økinum. Fólk vóru vinarlig, og teir hoyrdu nógvan góðan tónleik.

**nud**





## Starvsfólk til avgreiðsluna

Søkt verður eftir starvsfólki til avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

Arbeiði fevnir m.a. um:
• help-desk tænastur
• upplýsing um ferðslu
• leiðbeining í sambandi við netbókingar
• bílegging av ferðaseðlum og pakkatúrum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin
• hevur kunnleika til bókingarskipanir og ferðaseðlasølu.
• dugir at arbeiða við teldu
• hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
• kann arbeiða sjálvstøðugt
• kann arbeiða undir trýsti

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Heidi Askham á tlf. 34 10 10 ella e-mail: heidia@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com
www.sansir.fo



## Starvsfólk ella lærlingur til avgreiðsluna/støðina

Søkt verður eftir skrivstovufólki ella lærlingi til avgreiðsluna/støðina hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

Arbeiði fevnir m.a. um:
• avgreiðslu av ferðafólki
• avgreiðslu av flogførum
• telefonavgreiðslu
• avgreiðslu av ferðaseðlum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin (skrivstovufólkið) hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi. Lærlingur skal hava HH ella líknandi prógv.

• dugir at arbeiða við teldu
• hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
• kann arbeiða sjálvstøðugt
• hevur hug til at arbeiða skiftandi tíðir
• kann arbeiða undir trýsti

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Egin Simonsen á tlf. 34 10 22, 34 10 50 ella e-mail: egin@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com
www.sansir.fo